Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52 a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjørt Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Sólvit Nolsøe, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Familjur og børn sum liva í fátækt ella fátækraváða

Spurningar:

1. Hvussu stór inntøka krevst hjá einum húsarhaldi, fyri at hava nóg nógv at liva fyri við dagsins hækkandi prísstøði?
2. Nær verður ein familja ella persónur mettur at liva á ella undir fátækramarkinum?
3. Hvussu nógvar familjur og persónar í Føroyum kunnu í løtuni metast at liva í fátækt ella í fátækraváða, og hvussu mong børn teljast millum hesi?
4. Hvussu nógvar familjur og persónar metir landsstýrismaðurin hava tørv á bráðfeingis ella varandi fíggjarligum stuðli fyri at kunna liva eitt sømiligt lív?

Viðmerkingar:
Prísstøðið hækkar skjótt og ógvusliga. Á mati, gerandisvørum, klæðum, olju, bensini o.s.fr. Samstundis er prísurin á býli hægri enn nakrantíð.
Hvussu nógvur peningur, sum í minsta lagi skal til hjá einum húsarhaldi fyri at kunna hava sámilig lívskor, er alneyðug vitan hjá politiska myndugleikanum, skal nakað munagott gerast við støðuna.

Í 2014 fekk táverandi landsstýrismaður í almannamálum handað álitið "Eitt føroyskt fátækramark". Har varð ásett, hvat eitt nú ein stakur uppihaldari við børnum, ein familja við fleiri børnum og so frameftir kravdi at hava tøkt av inntøkuni fyri at kunna liva eitt nøkulunda vanligt lív. Í álitinum varð eisini m.a. víst á, at stakir uppihaldarar eru í størstum vanda fyri at gerast fátøk, og at hetta fátækradømi kann fáa stórar avleiðingar fyri børnini: "At vera fátækur í longri tíð er tað, sum kann hava álvarsligar avleiðingar fyri tann einstaka og ta einstøku familjuna, og fyri at koma undir fátækramarkið, skal inntøkan hava verið lægri enn 60 prosent av miðinntøkuni í 3 ár á rað. Men nýggjasta granskingin um fátækradømi vísir, at fyri børn kann eisini stutttíðar fátækradømi fáa neilig árin seinni í lívinum. Tí eigur áhaldandi dentur at verða lagdur á fátøk børn – eisini stutttíðar fátækradømi hjá børnum."

Barnafamiljur, fyritíðarpensjonistar og pensjonistar, sum einans hava lægstu veitingarnar at liva av, eru í størri fátækraváða, nú prísstøðið hækkar munandi. Spurningarnir verða settir fyri at fáa fram, hvussu mong í landinum nú kunnu metast at vera fátøk ella gerast fátøk. Hetta eru upplýsingar, myndugleikarnir vónandi hava til taks sum grundarlag undir einum neyðugum arbeiði við hjálp til fíggjarliga sperdar og neyðstaddar familjur.

Á Løgtingi, 24.maj 2022

Bjørt Samuelsen